# Umsókn um fiskiloyvi í bólki 5

**Tíðarskeiðið frá 1. september 2017 til 31. desember 2017**

## Bátaupplýsingar:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bátanavn: | | | |
| Havnakenningar nr.: | | Kallimerki : | |

## Eigaraupplýsingar:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Eigari / Eigarar : | | | |
| Bústaður : | | | |
| Postnummar : | | Bý / bygd : | |
| Heimatelefon : | | Fartelefon : | |
| Teldupostur : | | | |

| | |
|---|---|
| Avreiðingarvirði álmanakkaárið 2016 : | |
| Viðmerkingar : | |

Sambært kunngerð nr. 86 frá 14. juni 2011 um treytir fyri fiskiloyvi og reglur um fiskidagatal hjá fiskiførum í bólki 5 fær eigari av báti, sum í 2016 hevur avreitt fyri 400.000 kr. ella meir – tó undantikið virði av sild, makreli, brislingi, høgguslokki og gággu – fiskiloyvi 5A. Er henda treyt ikki lokin, fær eigarin fiskiloyvi 5B.

Váttað verður, at eigaravirðurskiftini eru sambært treytunum í § 7 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Herundir, at eigarin/eigararnir hava fast tilknýti til Føroyar, allir skulu vera skrásettir í fólkayvirlitinum seinastu tvey árini, og allir skulu vera fult skattskyldugir í Føroyum. Um eigararnir eru skipaðir í felagi, skulu eigararnir av í minsta lagi 2/3 av eginpeninginum herundir partapeninginum, umframt ábyrgdarpeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 2/3 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, lúka treytirnar omanfyri.

Dagfesting ________________ Undirskrift ________________________________

**Umsóknin + kvittan skal sendast til: Fiskiveiðieftirlitið, Yviri við Strond 3, Postrúm 1238, 110 Tórshavn ella fax +298 31 39 81 ella á loyvi@vorn.fo**

**Fiskiveiðieftirlitið**
Yviri við Strond 3 – P.O.Box 1238 – FO-110 Tórshavn – Faroe Islands
Tel. (+298) 31 10 65 – Fax (+298) 31 39 81 – www.fve.fo

# Leiðbeining í sambandi við umsóknir um fiskiloyvi í bólki 5 fyri 2017

**Hvør kann fáa fiskiloyvi í bólki 5?**
Í kunngerð nr. 86 frá 14. juni 2011 um treytir fyri fiskiloyvi og reglur um fiskidagatal hjá fiskiførum í bólki 5 er ásett, hvørjar treytir skulu vera loknar fyri at bátur undir 15 tons kann fáa fiskiloyvi. Trýst **her** fyri at lesa kunngerðina.
Allir bátar, ið avreiða, skulu hava fiskiloyvi. Fyri fáa fiskiloyvi, skal ein av hesum treytum vera lokin:
• Báturin skal hava verið skrásettur í Føroyum fyri 1. januar 1995, og skal ikki vera ræðisavmarkaður ella hava aðra avmarking til at reka vinnuligan fiskiskap
• Báturin skal í tíðarskeiðinum frá 1. januar 1995 til 31. august 2002 hava fingið útskrivað fiskiloyvi, og skal ikki vera ræðisavmarkaður ella hava aðra avmarking til at reka vinnuligan fiskiskap
• Báturin hevur fingið játtað loyvi at flyta fiskiloyvi av øðrum báti samsvarandi ásetingunum í § 8 í lógini um vinnuligan fiskiskap

**Fiskiloyvi 5A**
Hevur báturin í álamnakka árinum 2016 avreitt fyri minst kr. 400.000,-, tó undantikið virði av sild, makreli, brislingi, høgguslokki og gággu, verður fiskiloyvi 5A skrivað eigaranum.

**Fiskiloyvi 5B**
Hevur báturin í álmanakka árinum 2016 avreitt fyri minni enn kr. 400.000,-, tó undantikið virði av sild, makreli, brislingi, høgguslokki og gággu, verður fiskiloyvi 5B skrivað eigaranum.

**Avreiðingarvirði í 2016**
Tá søkt verður um fiskiloyvi, skal verða upplýst, hvat báturin hevur avreitt fyri í álmanakka árinum 2015 – frádrigið møguligt virði av sild, makreli, brislingi, høgguslokki og gággu.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn um fiskiloyvi skal sendast til: Fiskiveiðieftirlitið, Yviri við Strond 3, Postrúm 1238, 110 Tórshavn, ella fax +298 31 39 81 ella á **loyvi@vorn.fo**. Umsóknarskjalið er omanfyri á síðu 1. Er skjalið ikki rætt ella nøktandi fylt út, verður umsóknin ikki avgreidd stundisliga.

## Avgreiðslugjald

**Fiskiloyvið verður útskrivað, tá avgreiðslugjaldið upp á 500 kr. er goldið Fiskiveiðieftirlitinum. Avgreiðslugjaldið skal verða flutt á konto 6460 – 182.705.9 í BankNordik.**
**Tá goldið verður, skal verða upplýst : 1) Bátanavn og havnakenningarnr., 2) Kallimerki, 3) Eigari.**
**(Fyri at avgreiðslan skal ganga so skjótt sum gjørligt, skal kvittan fyri flytingina sendast við.)**
Hava tygum spurningar, eru tygum vælkomin at venda tygum til Fiskiveiðieftirlitið á tel 31 10 65 ella senda teldupost til **loyvi@vorn.fo**

**Fiskiveiðieftirlitið**
Yviri við Strond 3 – P.O.Box 1238 – FO-110 Tórshavn – Faroe Islands
Tel. (+298) 31 10 65 – Fax (+298) 31 39 81 – www.fve.fo